# Ketsjarnir fram aftur



*Kristin Joensen skuldi í gjár á vøllin at spæla single fyri menn í tennis*

**Føroysku tennisspælararnir fóru aftur í eldin í gjár. Singlurnar fóru í gongd fyrrapartin og um 11 tíðina, spældu føroysku spælararnir fyrsta dystin**

TENNIS
*Álvur/Ingrid*

**Guernsey:** Í gjár var tíð hjá føroysku tennisspælarunum at finna ketsjararnar fram aftur, tí tá byrjaðu singlurnar hjá føroysku monnunum.

Tennisskráin er tó seinkað eitt sindur av tí, at tað regnaði so illa seinnapartin mánadagin, og vøllurin var so vátur.

Men ein tíma eftir ætlaðu tíðarskránni fór fyrsti føroyski spælarin á vøllin. Tað eydnaðist okkum tó ikki at fáa nakað úrslit áðrenn evstamark.

Doublurnar vóru eisini á skránni í gjár, so tá dagurin var liðugur, høvdu allir føroysku tennisspælararnir verið á vøllinum.

Vit frætta meira um hesi úrslitini í blaðnum í morgin.

## Oyl-støður

**Borðtennis, lið**
Bólkur B

| | d | v - t | sett | v sett | t sett | +/- stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Guernsey | 5 | 5 - 0 | 29 | 6 | 23 | 10 |
| 2 Gotland | 5 | 4 - 1 | 27 | 8 | 7 | 9 |
| 3 Grønland | 5 | 3 - 2 | 17 | 18 | 1 | 8 |
| 4 Føroyar | 5 | 2 - 3 | 20 | 15 | 1 | 7 |
| 5 Áland | 5 | 1 - 4 | 5 | 29 | -10 | 6 |
| 6 Orkney | 5 | 0 - 5 | 6 | 28 | -12 | 5 |

**Flogbóltur, kvinnur**
Bólkur A

| | d | v - t | sett | v sett | t sett | +/- stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Grønland | 2 | 2 - 0 | 6 | 0 | 6 | 6 |
| 2 Føroyar | 1 | 1 - 0 | 3 | 0 | 3 | 3 |
| 3 Hitra | 1 | 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 4 Cayman | 2 | 0 - 2 | 2 | 6 | -4 | 2 |
| 5 Gibraltar | 2 | 0 - 2 | 0 | 6 | -6 | 2 |

**Flogbóltur, menn**
Bólkur A

| | d | v - t | sett | v sett | t sett | +/- stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Føroyar | 3 | 3 - 0 | 9 | 2 | 7 | 9 |
| 2 Grønland | 3 | 1 - 2 | 3 | 7 | -4 | 5 |
| 3 Áland | 2 | 1 - 1 | 5 | 3 | 2 | 4 |
| 4 Cayman | 2 | 1 - 1 | 3 | 4 | -1 | 4 |
| 5 Jersey | 2 | 0 - 2 | 2 | 6 | -4 | 2 |

**Fótbóltur, kvinnur**
Bólkur B

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Føroyar | 2 | 2 - 0 - 0 | 22 | 0 | 22 | 6 |
| 2 Jersey | 2 | 2 - 0 - 0 | 8 | 2 | 6 | 3 |
| 3 Isle of Man | 2 | 0 - 0 - 2 | 1 | 15 | -14 | 0 |
| 4 Isle of Wight | 2 | 0 - 0 - 2 | 1 | 15 | -14 | 0 |

# Og landið er ...

**Í gjár, týsdag, skuldi avgerðin fella, hvar oyggjaleikirnir verða í ár 2007. Tvey lond eru um boðið. Isle of Wight og Rhodes**



*Avgerðin skuldi í gjár fella, hvør verður vertur fyri oyggjaleikunum í 2007. Slagið stóð millum Isle of Wight og Rhodes. Henda myndin er frá setanini her á Guernsey*

OYGGJALEIKIR
*Álvur/Ingrid*

**Guernsey:** Um middagsleitið í gjár skuldi avgerðin fella, hvat land verður vertsland fyri oyggjaleikunum í ár 2007.

Tað er langt síðani avgjørt, at næstu ferð, tað vil siga í 2005, verða oyggjaleikirnir í Hetlandi, og í 2007 stendur slagið millum Isle of Wight og Rhodes.

Avgerðin verður tikin á árliga aðalfundinum hjá Altjóða Oyggjaleikanevndini, har londini skulu atkvøða um, hvar leikirnir skulu vera.

Vit megnaðu tíverri ikki at fáa úrslitið við áðrenn evstamark okkara, men í blaðnum í morgin vita vit endaliga úrslitið.

# Bermuda í hálvfinaluni



*Nýggju luttakararnir av Bermuda hava veruliga gjørt vart við seg í flogbóltinum, og nú hava teir vunnið seg fram til hálvfinalurnar, har teir skulu hitta føroysku menninar*

*Mynd: Álvur*

Týsmorgunin var avgerandi dysturin um næst fremsta plássið í bólki B í mansflogbólti. Her hevur Saaremaa mest sum tryggjað sær oddasessin, men dysturin um næsta plássið sum gevur atgongd til hálvfinaluna hevur verið harður.

Frá byrjan mundu fá ivast í, at Gotland var favoritturin til hetta plássið, men nýggju luttakararnir úr Bermuda hava tó víst nakað annað. Eftir at teir í fyrsta dystinum fingu rættiligan bank frá Saaremaa, hevur spælið hjá Bermuda verið alsamt betri, og tí var spenningurin undan Gotlandsdystinum hjá teimum stórur.

Her vann Gotland fyrsta settið 25-12, men so kom Bermuda. Tey bæði næstu settini vórðu vunnin rættiliga sannførandi við 25-15 og 25-19, áðrenn teir í einum sera spennandi fjórða setti vunnu 27-25.

Sostatt verður tað Bermuda, sum nú skal hitta Føroyar í hálvfinaluni, meðan Gotland fyri fyrstu ferð í mannaminni má siga farvæl til flogbóltin eftir bólkaspælið.

**- jm**



# Jóansøku-súkklingin hjá børnunum

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Í fagrasta veðri møttu børnini mannsterk til súkklingina á jóansøku. Fýra bólkar vóru, og súkklað varð á Ovara vegi, frá Sjúkrahúsinum og so inneftir.

Bólkur 1, tey 6-7-8 ára gomlu súkklaðu 2 km.

Bólkur 2, tey 9-10-11 ára gomlu súkklaðu 4 km.

Bólkur 3, tey 12-13-14 ára gomlu súkklaðu 6 km.

Unglingarnir súkklaðu til Øravíkar og aftur, ein teinur ið var 15 km.

Bólkarnir byrjaðu soleiðis, at tey, ið skuldu súkkla longst, byrjaðu fyrst.

Unglingarnir og bólkur 3 súkklaðu tíðarsúkkling, t.v.s. at tey byrjaðu við ávísum tíðarbili ímillum hvønn súkklara.

Hjá bólkunum 1 og 2 var samlaður startur brúktur, t.v.s. at øll stóðu á startstrikuni tá startskotið ljóðaði. Alt gekst væl, og komu øll á mál í øllum góðum.

Til jóansøkusúkklingina hesaferð møttu so nógv børn sum ongantíð fyrr, og at ansa ferðsluni vóru so nógvir løgreglumenn, at slíkt bara er sæð á Tvøroyri til kongavitjanir, so folk kunnu trygg senda børnini til slíkar kappingar.

Úrslitið av kappingini var hetta:

**Bólkur 1, tey 6-7-8 ára gomlu**

Dreingir:
1. Pætur Magnussen.
2. Egi Kárason Djurhuus
3. Bergur Mørkøre.
4. Pætur Michelsen
5. Hákun Hoffgaard
6. Rani Arnason Johansen
7. Aron Joensen & Torkil Thomsen

Gentur:
1. Marin Dimon
2. Valborg Johannesen
3. Rebekka Magnussen
4. Sólja Jensen

**Bólkur 2**

Dreingir.
1. Finnur Mellemgaard
2. Niels Christiansen
3. Gilli Sørensen

Gentur.
1. Evi Johannesen
2. Noomi Michelsen

**Bólkur 3**

Dreingir.

| | |
|---|---|
| 1. Torkil Weihe | Tíðin: 7.45 |
| 2. Poul Andr Ziska | Tíðin: 8.07 |
| 3. Jákup Lutzen | Tíðin: 8.16 |
| 4. Rúni Bláfoss | Tíðin: 8.17 |
| 5. Sigmundur Olsson | Tíðin: 8.34 |
| 6. Rani G Jacobsen | Tíðin: 8.42 |
| 7. Regin D Thomsen | Tíðin: 9.18* |

* Sigast skal, at meðan seks teir fyrstu høvdu góðar kappingarsúkklur, so brúkti Regin eina fjallasúkklu, so sjálvt um hann endaði á aftasta plássinum, so var úrslitið sera gott.

**Unglingar**
1. Bergur Johansen
2. Dánjal Michaelsen

# Frælsur Ítróttur fingið nýggjan høvuðsstuðul

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Tíðindaskriv*



*Heri Ziska, Jan Nielsen frá MBM og Rigmor N. Arge eftir at avtalan millum Frælsan Ítrótt Føroya og Mjólkarvirki Búnaðarmanna er undirskrivað*

Beint áðrenn farið varð til Oyggjaleikir á Guernsey, skrivaðu Frælsur Ítróttur Føroya og MBM undir samstarvsavtalu. Við avtaluni gerst MBM nýggjur høvuðsstuðul hjá frælsa ítróttinum.

Oyggjaleikaluttøkan er vanliga ein av heilt stóru útreiðslunum hjá frælsum ítrótti, soleiðis at tað hevur verið neyðugt at avmarka virksemið millum árini fyri at hava fíggjarliga orku at senda eitt landslið avstað til oyggjaleikir hvørja ferð.

Við avtaluni við MBM verða fíggjarligu karmarnir hjá frælsa ítróttinum munandi bøttir.

Hóast stór tilgongd hevur verið seinnu árini innan motiónsrenning á vegunum kring landið, hevur tað víst seg at vera ein stór avbjóðing at økja áhugan fyri frælsum ítrótti innan lop, kast og renning á rennibreyt.

Hetta kemst fyrst og fremst av, at bert eitt øki er til slíkt virksemi í landinum.

Báðir partar vóna, at avtalan fer av styðja upp undir menningarætlaninar hjá FÍF, sum í fyrstu syftu snúgva seg um at geva børnum og ungum betri møguleikar at íðka frælsan ítrótt í venjing og kapping.

Frælsur Ítróttur Føroya fer í næstum undir at skipa fyri venjaraskeiðum innan frælsan ítrótt.

